# helt fram á brúnni





Logos II hevur verið opin allar dagarnar fyri vitjandi. Her fáa nakrar gentur andlit síni málað



Stóra bókasølan umborð var væl vitjað. Fleiri enn 5000 titlar vóru at velja ímillum, og tí mundi okkurt verða til einhvønn tørv

” *Hetta var kanska ein løgin máti at byrja sjólívið uppá, at fara sín fyrsta túr til skips við einum trúboðaraskipi*
*(Trúgvi Petersen, stýrimaður á Logos II)*

” *"Trúgvi, nú er tað tín túrur. Tak tú nú títt tørn!*
*(Trúgvi Petersen, stýrimaður á Logos II)*



Diana Johannesen úr Klaksvík hevur siglt við Logos II. Stuttligt er at práta við Trúgva um gamlar dagar



Trúgvi byrjaði á dekkinum, men er nú stýrimaður umborð á Logos II. Henda gamla umstýringin verður í næstum skift út til nútíðar útgerð umborð á Logos Hope

týðir sera nógv fyri okkum, sigur Trúgvi.

### Í føroyskan sjógv

Vanliga er siglingarleiðin hjá Logos II løgd langt fram í tíðina. Soleiðis kann fólkið umborð – og ikki minst tey í landi – fyrireika alt so væl til vitjanina.

Einu tíðina var ætlanin at Logos Hope skuldi koma til Føroyar í ár, men av tí at arbeiðið at rigga skipið til av nýggjum, tók longri tíð enn mett, varð avgjørt at Logos II skuldi koma hendavegin ístaðin.

Hetta var avgjørt so seint sum í februar mánaði í ár, men hetta hevur kortini ikki forðað arbeiðinum í at fyrireika hesa vitjanina á besta hátt.

Tá tað fréttist umborð, at Logos II skuldi koma í føroyska havn, vóru hetta góð tíðindi hjá Trúgva og hinum føroyingunum umborð.

- Hetta var ein sera spennandi vitjan, tí vit her sluppu at síggja familjuna aftur.

- Jú, tað var serstakt at koma heim við skipinum, og at vit skuldu vera vertir við hesa vitjanina, sigur hann.

## Familjan umborð

Trúgvi er tó ikki einsamallur umborð á Logos II. Við sær hevur hann konuna Bjartu og tvey børn. Bjarta er við í barnaansingini nakrar tímar um dagin, men er haraftrat við í seymirúminum. Hon tekur sær millum annað av at umvæla og seyma klæðir til manningina. Her kann til dømis verða talan um búnar til ein dramaleik, arbeiðsklæðir ella bara tað at seyma ein knapp í. Arbeiðið hjá Trúgva er fyrst og fremst tað, sum hoyrir við til starvið sum stýrimaður. Hetta er millum annað at syrgja fyri viðlíkahaldsarbeiðinum umborð og at hava ábyrgd fyri monnunum á dekkinum.
Her hava teir eina skipan sum ger, at hesir menninir ikki bert skulu rokast á dekkinum, men eisini sleppa út í missión.
Teir hava her gjørt eina skipan, soleiðis at dekkararnir hava ein dag um vikuna, har teir kunnu gera ymiskt andaligt arbeiði.

## OM í 50 ár

Í summar eru liðin 50 ár síðani George Verwer og nakrir av lestrarvinum hansara byrjaðu tað, sum seinni skuldi gerast til ein kristnan missiónsfelagsskap.
Teir koyrdu tá á fyrsta sinni koyrdu úr USA til Mexico fyri at brúka eina summarfrítíð at bera gleðiboðskapin til onnur menniskju. Hetta gjørdist so líðandi til Operation Mobilisation (OM). Í dag arbeiða fleiri enn 4000 fólk innan OM í fleiri enn 100 londum.
Hátíðarhaldið verður hildið kring allan heimin á ymiskan hátt. Í Danmark er ætlanin at gera nógv burtur úr, tá Logos Hope (gamla Norröna) kemur til Danmarkar um stutta tíð.
Vitjanin hjá Logos II á Tvøroyri kann tí sigast at hava verið við í byrjanini til hátíðarhaldið, sum kemur at halda fram hetta komandi árið.